# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 30 árum síðan:

## Próvtøka á Læraraskúlanum í 1979



Fyri 30 árum síðan fingu 27 lærara-skúlanæmingar prógv á Føroya Læraraskúla.

**Aftasta rað f.v.:** Poul Jacob Zachariassen, Hattarvík, Heri Jacobsen, Tórshavn, Sjúrður á Kósini, Klaksvík, Fritleif Henriksen, Sandavágur, Verner Hansen, Tórshavn, Per Andrew Olsen, Skála, Páll Mortensen, Tvøroyri, og Súni í Hjøllum, Toftir.

**Miðraðið f.v.:** Kristjan Højsted, Funningur, Sjúrður Mikkelsen, Sørvágur, Herálvur Jacobsen, Sørvágur, Maria Jacobsen, Vestmanna, Sjúrður Hansen, Sørvágur, Kristjan Christiansen, Tórshavn, Sigrun Petersen, Vestmanna, Álvur Enni, Tvør-oyri, Sæbjørn Olsen, Kunoy, Vagnur Dahl-Michelsen, Tórshavn og Martin Ejdisgaard, Tvøroyri.

**Fremst f.v.:** Solveig Isfeldt, Tórshavn, Brynhild Hansen, Tórshavn, Liljan Thomsen, Sandavágur, Karin Hammer, Tórshavn, Sigfríða Lamhauge, Klaksvík, Thurid Hattarstein, Miðvágur, Mai Breckmann, Tórshavn, og Margretha Bjarnastein, Tórshavn.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*

**Dagurin**
**17. juni. Bótolvsøka ella bótolvsmessa.**
Munkurin Botolphus stovnaði kleystur í Lincolnshire í Onglandi, og býurin Boston eitur eftir honum. Hann doyði umleið ár 680.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Útferð hjá Tilhaldinum á Sandi

Mikudagin 10. juni skipaði Tilhaldið á Sandi fyri útferð inn á meginlandið. Tey komu við Teistanum á Gomlurætt klokkan 8.40 um morgunin. Fyrst var vitjað í nýggja fjósinum í Havnardali, síðan handilin INN við Norðskála, og so ein góðan fiskadøgurða á Sjókaféini í Runavík.

Á Toftum var vitjað í tógvhandlinum Navia, á Føroya Fiskamarknaði og í Fríðrikskirkjuni, har greitt var frá um kirkjuna og felagssálmur varð sungin. Eftir tað varð koyrt til Gomlurætt, og kl. 15.45 sigldi Teistin til Skopunar. Ferðaleiðari á túrinum var Kristina á Reynatúgvu.

*Myndir: Sámal Bláhamar*



*Á Toftum var m.a. vitjað í tógvhandlinum Navia og á Føroya Fiskamarknaði*





